


Ford Motor Company
100 ár

Ford Focus Fakta:

1. Mest feilfríi samb. TVÜ kanning.
2. Mest seldi bilur í heiminum 2000/2001.
3. Ársins bilur 1999.
4. Kom á toppin við einum nýggjum Ford Focus.




# 100 ára jubileumstilboð!

100 x 100 kr. avsláttur = 10.000 kr.

Inkl. Metallakk
Inkl. Radio við fløguspælara
Inkl. Alufelgur
4 vetrardekk á felgum fyri ½ prís

Bilurin er heilgalvaniseraður
12 ára rustgaranti
2 ára mekaniskan garanti
Avmarkað nøgd á lagri

Upplatingartíðir: Mánadag -Fríggjadag: 8.00 - 17.30 - Leygardag: 10.00 - 16.00


Jóhan Petur
tlf. 354508


Jógvan
tlf. 354505


Lennard
tlf. 354506

Ford
P/F Wenzel

www.wenzel.fo, Akranesgøta 5, tlf. 354500.

SJÓNBAND 317774

# Útbjóðing

## Klaksvíkar kommuna

## Ídnaðarhavn í Ánunum

Við hesum bjóðar Klaksvíkar kommuna arbeiðið at gera atløgusíðu í Ánunum út í almennari lisitasjón.

Byggiharrin treytar sær rætt til frítt at velja millum tey innkomnu tilboðini, ella at havna øllum.

Arbeiðið fevnir um at uppseta stálspunsvegg við tilhoyrandi akkerum fyri atløgusíðu, 150 m. til longdar og tilhoyrandi rampu 30 m. til breiddar. Dýpið er 12 m.

Eisini skal grótfylla útleggjast aftan og frammanfyri spunsvegg.

Áhugað kunnu venda sær til:

**Preban Hansen,**
**ráðgevandi verkfrøðingur**
Argjaboðagøta 7
FO-160 Argir, tlf. 312025 ella 221142
Teldupost: phansen@post.olivant.fo

áðrenn tann 9. apríl 2003, kl. 12.00

Útbjóðingartilfarið verður útflýggjað ímóti kr. 5.000,- sum krossaður kekkur í veð.

Lisitasjónin verður tann 19. mai 2003 kl. 14.00 á skrivstovuni hjá Klaksvíkar kommunu N. Pálsgøta 32, FO-700 Klaksvík.

# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 15. mai 2003.

Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur við 2 stovum, 15 børn í hvørjari í aldrinum frá 3-7 ár.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevnir
- Er røkin, nærlagdur og álítandi
- Er nýhugsandi og ígongdsetandi
- Dámar væl at vera úti í náttúruni

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Lønarstig 9.

Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Súsonnu á Stongum, tlf. 332948.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 23. apríl 2003.

**Barnagarðurin Sýslan**
FO-380 Sørvágur

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Útbjóðing av lastbilaflutningi

Flutningur av skervi og sandi millum bryggjuna á Langasandi og grótbrotið í Hundsarabotni, verður við hesum boðin út alment.

Áhugað kunnu venda sær til LV-skrivstovuna, Tinghúsvegi 5, tlf. 311333, har frágreiðing og treytir fáast útflýggjað.

Licitatiónin verður hjá Landsverkfrøðinginum 22. apríl, kl. 13.00.

**Landsverkfrøðingurin**

# Frá Føroya Arbeiðarafelag

Boðað verður til fundar fyri allar dagrøktarmammur, ið arbeiða innan øki hjá Føroya Arbeiðarafelag.

Fundurin verður mikukvøldið 9. apríl 2003 kl. 18.30 í hølum Føroya Arbeiðarafelags, Tjarnardeild 7.

Fundarskrá: Sáttmálaviðurskifti.

**Føroya Arbeiðarafelag**



**Fiskimálaráðið**
*Fiskiveiðieftirlitið*

# Samskipari til Fiskiveiðieftirlitið

Starv sum samskipari á Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Fiskiveiðieftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, har møguleiki verður fyri at royna seg á einum øki, ið alla tíðina er fyri øktum krøvum á altjóða støði, og har dagføring og menning av skipanum og starvsfólkum er ein týðandi liður í dagliga arbeiðinum.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Áhaldandi viðlíkahalda og dagføra trygdar- og leiðsluskipanina eftir ISM-koduni,
- Ráðgeva deildarstjóranum og taka sær av øllum málum viðvíkjandi viðlíkahaldi av skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum
- Hava dagligu umsitingina av starvsfólkaviðurskiftunum á Fiskiveiðieftirlitinum um hendi
- Annað fyrifallandi arbeiði í samband við skipini.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarin skal:
- Hava útbúgving sum verkfrøðingur ella
- Hægstu maskinmeistaraútbúgving ella
- Hægstu nautisku útbúgving
- Hava góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt
- Hava góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa

Hollar starvsroyndir og royndir við at seta í verk skipanir er ein fyrimunur.

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytirnar eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar tess, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheitið er samskipari og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til deildarstjóran.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja til Fiskimálaráðið tlf. 353030 og tosa við Elmar Højgaard, deildarstjóra á Fiskiveiðieftirlitinum.

**Umsóknir:**
Umsóknir, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu verða Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 22. apríl 2003 kl. 1600.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskiveiðieftirlitið**
Postsmoga 347
110 Tórshavn

# FORMEL 1

SILVERSTONE 17. – 21. juli



Í samstarv við Atlantic Airways, skipar MB-Tours fyri túri til Formel 1

**KOSTNAÐUR 7.995,-**

Íroknað er:
- Flogferð Vágar - London t/r (v/ ferðaavgjøldum)
- Gisting í 4 nætur á dupult kamari v/ morgunmati
- Atgongumerkið til Formel 1 (leygardag og sunnudag)
- Bussur frá flogvøllinum til hotellið t/r
- Bussur frá hotellinum til Silverstone t/r

Eyka kostnaður fyri einakamar er kr. 1000,-

MB-TOURS ATLANTIC AIRWAYS

**Tilmelding á tel 32 21 21**

HOYVÍK

# *Fólk til nonfood deildina*

Keypssamtøkan í Hoyvík sóknast eftir fólki til nonfood deildina.

Tann ið settur verður, má kunna arbeiða sjálvstøðugt og helst hava roynd frá líknandi arbeiði.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, at byrja 1. mai 2003 ella eftir avtalu.

Løn samb. avtalu.

Meira fæst at vita um starvið og arbeiðstíðir, við at venda sær til Bent Lundsgaard, tlf. 31 41 49.

Skrivlig umsókn skal í seinasta lagi 12. apríl sendast til

**FK Hoyvík**
**Box 349**
**188 Hoyvík**

# Radiohandil á bygd til sølu

Um hóskandi boð fæst, er vælrikin radiohandil við íbúð til sølu.

Sera gott samband er til meginøkið.

**Bill.mrk. 650**

Lesið Sosialin

www.vestmannabjorgini.com